# Taktikkurin helt

**HONDBÓLTUR** – Vit høvdu fyrireikað okkum væl, so vit vistu, hvussu vit skuldu taka Stjørnuna, ið eisini spældi ímóti okkum, sum vit høvdu væntað, segði venjarin hjá Tjaldri, Trygvi Mortensen

Hilmar Jan Hansen

Fríggjadagin segði Trygvi Mortensen við Sosialin, at hann ikki trúði so nógv upp á taktikk í einum finaludysti. Men tað vísti seg nokk so tíðliga í kvinnufinaluni, at eitt sindur av taktikki var við hjá Tjaldri – og tað riggaði.

– Vit høvdu fyrireikað okkum væl, so vit vistu, hvussu vit skuldu taka Stjørnuna. Fyrst og fremst løgdu vit dent á verjuspælið, samstundis sum vit høvdu fyrireikað okkum uppá, hvussu Stjørnan fór at taka ímóti okkum, tá vit høvdu álop, segði 43 ára gamli venjarin hjá Tjaldri, sum eftir dystin stóð gjøgnumbloyttur við handklæði um herðarnar.

– Lagið er øgiliga gott í umklæðingarrúminum nú, og tað fingu bæði eg og Damir, hjálparvenjarin, at kenna. Vit blivu undirdíktir í bæði vatni og sjampanju, so nú havi eg karm.

Samstundis sum taktikkurin helt, hevði Trygvi alla orsøk til at vera nøgdur við avrikið hjá sínum spælarum:

– Verjuspælið riggaði øgiliga væl, og sum dysturin háttaði seg, komu skjúttarnir eisini veruliga til sín rætt. Adina og Simona vóru ótrúligar og skutu 21 av teimum 26 málunum, men alt telur við.

Hóast ikki ókendur frá hondbólti, so er Trygvi Mortensen eitt rímiliga óskrivað blað sum hondbóltsvenjari, og steypafinaluna hevði hann fyrr bert roynt sum dómari.

– Ja, eg kenni hesar fantastisku karmarnar aftur, tí eg havi verið við til at dømt onkra finalu. Men at koma higar sum venjari og uppliva alt hetta, var heilt fantastiskt og ótrúliga stuttligt, segði hann.

– Tá eg tók við sum venjari í heyst, setti eg mær fyri, at vit bæði skuldu í steypafinaluna og FM-finaluna. Nú hava vit so verið í aðrari og vunnið hana, so nú fara vit at kappast víðari við Stjørnuna og Neistan um at koma í hina eisini.

*hilmarjan@sosialurin.fo*




*Trygvi Mortensen, venjari hjá Tjaldri*

*Myndir: Álvur Haraldsen*

**Tjaldur - Stjørnan** 26-22 (16-11)

Dómarar: Karstin Joensen & Kristian Joensen

**Tjaldur:** Adina Petrea 11 (3), Simona Petersen 10, Sarah Ann Thomsen 2, Beinta Joensen 1, Benadikta Johannesen 1, Annika Thomsen 1
**Stjørnan:** Durita Ljósstein 9 (2), Bára Skaale Klakstein 4, Una Olsen 3, Alina Anghel 2, Judit Hansen 2, Valentina Suciu 2
Brotskøst: Tjaldur 4, Stjørnan 3
Útvisingar: Tjaldur 7, Stjørnan 5

# GULT



**HONDBÓLTUR** Tjaldur vardi og skjeyt seg til ein fult uppibornan sigur á Stjørnuni í kvinnufinaluni. Nokk so skjótt fór Tjaldur væl framum, og tað var bara eina lítla løtu ímóti endanum, at tað mundi blivið spennandi, tí Stjørnan slapp ongantíð ordiliga í gongd í dystinum

Hilmar Jan Hansen

Longu frá fyrstu løtu sást, at verjan hjá Tjaldri var til reiðar at taka ímóti Stjørnuni. Gamaní, fekk Stjørnan eitt mál her og har, men liðið hevði ongantíð nakra veruliga gjøgnumbrotskraft ímóti kontantu og sterku verjuni hjá Tjaldri, ið dugdi serstakliga væl at pilka skjúttarnar hjá Stjørnuni niður, so einki kom burturúr.

Hinvegin vóru teir báðir bestu skjúttarnir hjá Tjaldri serstakliga væl upplagdir. Adina Petrea og Simona Petersen skutu 21 av teimum 26 málunum hjá Tjaldri, umframt at tær gingu undan í verjuspælinum.

Serliga var Simona Petersen stóri profilurin í hesi finaluni, tí hon vísti so stóran vilja til at vinna, at tað kundi ikki annað enn smitta restina av liðnum. Hon stríddist og skjeyt, so tað veruliga munaði, og eitt nú var hon við fimm teimum síðstu málunum fyri steðgin við til at leggja botn undir sannførandi sigurin.

Adina Petrea spældi, sum hon plagar, tá væl liggur fyri, og umframt at plasera skotini ótrúliga væl, dugdi hon sera væl at spæla hinar á liðnum, so tað var nærum vónleyst hjá Stjørnuni at lesa, hvat fór at henda. Og hóast Stjørnan í løtum dekkaði við eittara fyri at skerja Adinu, gjørdi tað stórt sæð ongan mun.

## Ongantíð í gongd

Stjørnan kom í veruleikanum ongantíð ordiliga í gongd í finaluni. Ein orsøk mundi vera kalda spannin av vatni, ið tað var, at Tjaldur longu fyrstu 10 minuttirnar kom á odda 8-4. Og hóast Stjørnan ta einu løtuna mitt í fyrra hálvleiki kom upp á 9-9, sá tað slett ikki sannførandi út.

Fyrstu løtuna eftir steðgin tóktist Stjørnan fáa fatur í rætta endanum eina løtu, men hetta skyldaðist eitt nú, at Tjaldur fekk Simonu útvísta tvær ferðir innan fyri átta minuttir. Skjótt fór Tjaldur aftur avstað, og tá tóktist tað ikki, sum hevði Stjørnan nakað munagott móttrekk.

Serliga saknurin av skotstyrki útifrá darvaði spælinum hjá klaksvíkskvinnum, har tað bara var Durita Ljósstein, ið megnaði nakað. Valentina Suciu og Alina Anghel fingu bara tvey mál í part og vóru sera lítið sjónskar í álopsspælinum, har Bára Skaale Klakstein var mestsum tann einasta aftur at Duritu, ið megnaði nakað.

Fimm minuttir fyri tíð fekk Stjørnan minkað um munin niður í tvey mál, men allíkavæl gjørdist tað ongantíð ordiliga spennandi, tí yvirskotið hjá Tjaldri yvirstrálaði tilvildarligu royndirnar hjá Stjørnuni at vinna seg innaftur í dystin. Sjálvt ikki, tá bæði Adina og Simona blivu tiknar burturúr, munaði tað nakað serligt, og Adina kundi í tí eina førinum næstan spáka ígjøgnum og skora...

## Enn er FM eftir

Samanumtikið vann Tjaldur ein fult uppibornan sigur, ið bygdi á trygt og sterkt verjuspæl, samstundis sum liðið fekk nógv meira burtur úr sínum álopsspæli. Ikki minst vóru skjúttarnir í rætta essinum, og tá er beinanvegin torført at standa hinumegin og skula taka ímóti.

Stjørnan fann ongantíð sín eyðkenda stríðsvilja fram í nóg stóran mun, og haraftrat gjørdust skjúttarnir ikki nøkur hóttan, ið kundi máta seg við mótstøðuna. Meginpartin av fyrra hálvleiki fylgdi Stjørnan nøkulunda við, men var ongantíð í nánd av at fara framum, og tað kostaði so mikið av kreftum, at tað kundi ikki røkka longur.

Enn er so landskappingin eftir, og har eru tað ikki bara steypafinalistarnir, ið eru upp á spæl, men eisini kvinnurnar hjá Neistanum. Sum er, liggur Stjørnan best fyri, men enn er so mikið eftir á mál, at nógv kann henda. Ikki skal undra, um tann endaspurturin verður væl meira spennandi enn steypafinalan var tað hesa ferð.